granskingarráðið
RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

# Treytir fyri stuðli til føroyskt vísindastarv

Við heimild í reglum um stuðul til útgávu av vísindaverkum o.l., samtyktar av granskingarnevndini 22. oktober 2015 við broytingum 5. desember 2019 og 2. oktober 2023, verða fylgjandi treytir og stuðulsupphæddir ásettar:

**§ 1**

Granskingarráðið kunnger á heimasíðuni www.gransking.fo , hvat stuðul kann latast til.

Umsókn um stuðul skal skrivast á umsóknarportalin: https://umsokn.com/app/scientificpublications

Umsóknir verða viðgjørdar aftaná hvønn 1. í mánaðinum.

**§ 2**

Stuðul kann latast til partvíst endurgjald fyri útreiðslur í sambandi við útgávu av javnlíkamettum vísindaverki.

- Til útgávu av grein í open access tíðarriti kann stuðulin í mesta lagi verða 8.000 kr.
- Til útgávu av bók, eitt nú monografi, doktararitgerð ella greinasavni, kann stuðulin í mesta lagi verða 15.000 kr.

Stuðul kann latast sum partvísur stuðul til onnur serlig átøk. Stuðul til eitt átak kann í mesta lagi vera 25.000 kr.

**§ 3**

**Greinar í Open Access tíðarritum**

Stk. 1

Stuðul kann verða latin sum ískoyti til gjald fyri útgávu av vísindaligari grein í Open Access tíðarriti. Stuðulin kann í mesta lagi verða 8.000 kr., tó ongantíð meira enn samlaði kostnaðurin, mótroknað annan møguligan stuðul til sama endamál. Annar stuðul skal upplýsast í sambandi við umsókn.

Stuðulin er ætlaður yngri granskarum, sum eru ávegis at fóta sær sum granskarar, t.d. við ph.d.-verkætlan. Í viðgerð av umsóknini verður mett um, hvussu útgávan mennir føroyskt vísindastarv, bæði í mun til kor hjá umsøkjara og týdningin av evninum.

Sum útgangsstøði verður stuðul ikki latin royndum vísindafólki, sum hevur fastar karmar at virka í og sum eigur at hava fígging til endamálið gjøgnum fast ella verkætlanarfíggjað starv á granskingarstovni.

Umsøkjarin skal sum høvuðsregla vera fyrstihøvundur á greinini. Í øðrum lagi skal verða grundgivið nágreiniliga fyri, hví tørvur er á stuðli til aðrar høvundar.

Stk. 2
Umsókn um stuðul skal sendast Granskingarráðnum í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at útgávan er tøk í Open Access tíðarriti.

Meginreglan er, at stovnur/virki, sum umsøkjarin er knýttur at, rindar fyri útgávu av greinini og fær játtaða stuðulin sum partvíst endurgjald. Stovnur/virki eigur at tryggja, at umsóknin verður send inn, so at gjaldið fyri greinina og játtaður stuðul fyriliggja í sama fíggjarári.

Umsøkjari, sum sjálvur rindar fyri útgávuna, skal stutt greiða frá sínum umstøðunum.

Hvør grein kann bara fáa stuðul 1 ferð.

Hvør granskari kann í mesta lagi fáa játtað stuðul 2 ferðir um árið.

Stk. 3
Játtaður stuðul verður útgoldin, tá skjalprógv fyriliggja.

Kravd skjalprógv:
1. Skjalprógv fyri javnlíkameting av útgávuni.
2. Kvittan fyri gjald til open access útgávu.
3. Endaliga góðkend grein í pdf og/ella leinki til grein á netinum.

**§ 4**

**Bøkur**
Stk. 1
Stuðul kann verða latin sum ískoyti fyri prentkostnað av javnlíkamettari bókaútgávu sum monografiir, doktararitgerðir og greinasøvn.

Stuðulin kann í mesta lagi verða ein triðingur av prentkostnaðinum uttan mvg, tó ongantíð meira enn 15.000 kr. Annar stuðul skal upplýsast í sambandi við umsókn.

Stuðulin er serliga ætlaður yngri granskarum, sum eru ávegis at fóta sær sum granskarar.

Stk. 2
Umsókn um stuðul skal sendast Granskingarráðnum, áðrenn bókin verður givin út.

Í umsóknini skal verða víst á, hvussu útgávan mennir føroyskt vísindastarv, bæði í mun til kor hjá umsøkjara og týdningin av evninum.

Stuðul til bókaútgávu verður rindaður til forlagið, um ikki annað verður avtalað.

Stk. 3
Kravd skjalprógv:

1. Skjalprógv fyri javnlíkameting av útgávuni.
2. Samlað fíggjarætlan við avriti av prenttilboði/kostnaði og upplýsingum um annan stuðul.

Játtaður stuðul verður útgoldin, tá bókin fyriliggur.

**§ 5**

**Onnur átøk**
Stuðul kann latast til onnur serlig átøk.

Serlig átøk kunnu vera átøk, sum miðla ella á annan hátt sjónliggera føroyskt vísindastarv við denti á granskingarúrslit. Hetta kann verða sendirøðir, talgild amboð ella líknandi.

Stuðul verður ikki latin til ráðstevnur.

Stuðul til eitt átak kann í mesta lagi vera 25.000 kr., tó ongantíð meira enn helvtina av kostnaðinum uttan mvg. Hvørt átak kann bara fáa stuðul 1 ferð.

Kravd skjalprógv:
1. Neyv lýsing av átaki
2. Útgreinað fíggjarætlan
3. Hóskandi skjalprógv fyri, at átakið er ella verður framt sambært ætlan.

Stuðul til onnur átøk verður rindaður sambært avtalu.

**§ 6**

Í samráð við stuðulsmóttakaran kann grein eisini verða skrivað til www.gransking.fo um útgávu ella átak.

Góðkent á fundi hjá Granskingarnevndini tann 22. oktober 2015, broytingar góðkendar á fundi hjá Granskingarnevndini 5. desember 2019 og av fyrisiting Granskingarráðsins 2. oktober 2023.

Annika Sølvará
stjóri

Maria Húsgarð
fulltrúi